## Gleipnir í fyrstu útgávu

Gleipnir er navnið á einum nýggjum kunningarskrivi til limafeløgini hjá Fótbóltssambandinum, sum starvsnevndin ætlar sær at senda út regluliga. Gleipnir er, sambært nørrunu gudalæruni, navnið á ketuni, ið bant og helt Fenrisúlvinum, sum áður hevði slitið tvær ketur. Tað, sum eyðkendi Gleipnir, var, at hóast ketan var tunn og mjúk sum silki, var hon sterkari enn nøkur jarnketa. stendur millum annað at lesa í fyrstu útgávuni.



## Ronaldinho fer ikki til OL

28 ára gamli Ronaldinho var upprunaliga millum nøvnini, sum skuldu umboða Brasil í OL, sum byrjar í næstum. Hetta verður tó av ongum. FC Barcelona, har Ronaldinho framvegis er sáttmálabundin, loyvir ikki framrættaða leikaranum til leikirnar í Beijing. Leiðslan í felagnum sigur, at allar leikararnir skulu verða til staðar mánadagin, tá fyrsta venjingin eftir summarsteðgin verður á skránni. Fleiri leysasøgur hava verið seinasta mánaðin um eitt møguligt skifti hjá Ronaldinho, men hetta verður nú eftir øllum at døma av ongum.

# Tingast um milliónir

**800 atgongumerkir eru seld lokalt, og praktisku viðurskiftini eru við at koma upp á pláss, verður sagt úr Sundalagnum, har tey tey um middagsleitið í dag arbeiddu við at fáa sjónvarpsrættindini í rætt lag**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi hevur ov mikið um oyruni í hesum døgum.

– Men tað gongur fínt og sum vit hava planlagt, letur hann at. Hetta merkir, at arbeitt verður frá morgni myrkurs.

– Tey eru fá, sum eru við í fyrireikingunum, ið fara til songar áðrenn midnátt, og ofta verður klokkan væl meiri enn tað eisini, sigur Rólant Højsted.


Sosialurin
Barna-deildin fingið teldurnar
Konmans-mýra eitur Birkilund
Tryggja móti náttúruvan-lukkum
Potemkin skilir eink
MILLIÓNIR RULLA Í SUNDA-LAGIÐ

*Sosialurin skilir í dag, at tað er millum 1,5 og 2,5 milliónir, sum útlendsku sjónvarpsrásirnar og EB/Streymur tingast um. Rólant Højsted hevur tó onga viðmerking til hesi tøl*

### Selt 800 atgongu-merki

Sunnukvøldið byrjaði EB/Streymur at selja atgongumerki til dystin komandi hósdag. Hetta gjørdu tey í húsinum við vøllinum við Margáir í Streymnesi, og veruligur gravgangur var eftir teimum. – Lokalt eru seldar 800 atgongumerki, og nú eru atgongumerki eisini koyrd út til kunningarstovurnar kring landið, upplýsir Rólant Højsted.

Hann sigur eisini, at hvat vaktum, trygd og sølu annars viðvíkur, er alt við at vera upp á pláss.

### Broytt suður-oyarleiðina

At Manchester City-vitjanin er størsta avbjóðing, eitt føroysk felag nakrantíð hevur staðið yvir fyri, man fáur ivast í. Tískil er áhugin fyri dystin stórur kring landið. – Tey hava ringt nógv úr Suðuroynni, so nú hava vit syrgt fyri, at ferðaætlanin er broytt soleiðis, at tey sleppa suður aftur eftir dystin, sigur Rólant Højsted. Smyril siglir sum vant norður kl. 15.20, og ferð suður aftur kl. 21.15.

### Væl nøgd umboðsfólk

Fríggjadagin vóru umboðsfólk fyri Manchester City í Føroyum. Tey kannaðu umstøðurnar her, fundaðust við umboð frá EB/Streymi og leitaðu sær upplýsingar og vitan um landið. – Tey vóru bara væl nøgd, og hevdu einki at seta fingur á. Onkur krøv settu tey tó, men einki, ið vit ikki kunnu uppfylla, ger formaðurin í EB/Streymi greitt. Hann leggur skemtandi aftrat, at einki krav um hárturkarar ella annað tílíkt er framsett, sum tá italiumenninir vitjaðu 2. juni fjør.

### Tingast um sjónvarpsrætt

Tá vit høvdu Rólant Højsted á orði um middagsleitið í dag, vóru tey í sølusamráðingum um sjónvarpsrættindini til dystin á Tórsvølli næsta hósdag. Einki var endaliga komið upp á pláss tá, og formaðurin ynskti heldur ikki at gera tær stóru viðmerkingarnar til sjálvar samráðingarnar.

Í farnu viku mettu vit í blaðnum, at dysturin fór at geva eitt stað ímillum 1,5 og 2,5 milliónir krónur. Hetta grundað á inntøkurnar B36 fekk burtur úr at selja sjónvarpsrættindini til dystin móti Fenerbache fyri tveimum árum síðani. Sosialurin skilir í dag, at tað er áleið hesi tøl, sum útlendsku sjónvarpsrásirnar og EB/Streymur tingaðust um um middagsleitið í dag.



## 67 manningar á Vestanstevnu

**23 barnamanningar og 50 manningar til FM-róðrarnar – tað er seks fleiri enn á Fjarðastevnu í Vestmanna síðsta vikuskifti – eru til reiðar at rógva, nú Vestanstevna verður hildin í Miðvági. Startrøðin er løgd eftir, hvussu úrslitini vóru á seinastu FMstevnuni, og liggja bátarnir í hesi røð á startmálinum:**

**Barnaróður, gentir**
3 Junkarin
4 Falkur
5 Spógvin
6 Hvassi
7 Títlingur
8 Ørnin
9 Frúgvin
10 Kollur
11 Fípan Fagra
12 Tjaldrið
13 Teistin
14 Tambar
15 Blikur

**Barnaróður, dreingir**
4 Drekin
5 Havfrúgvin
6 Frúgvin
7 Títlingur
8 Teistin
9 Jallurin
10 Spógvin
11 Junkarin
12 Blikur
13 Ørnin

**Fimmmannafør, gentur**
6 Tambar
7 Jallurin
8 Hvassi
9 Drekin
10 Junkarin
11 Firvaldur
12 Blikur (2G)

**Seksmannafør, kvinnur**
7 Lómur (2G tjst.)
8 Fortuna
9 Jarnbardur
10 Gongurólvur (1G)

**Fimmmannafør kvinnur**
5 Blikur (1G)
6 Ritan
7 Báran
8 Frúgvin
9 Sílið
10 Katla
11 Erla Kongsdóttir
12 Teistin

**Seksmannafør menn**
3 Jarnbardur
4 Fortuna
5 Lómur
6 Gongurólvur
7 Hósvíkingur
8 Sundabáturin
9 Riddarin (1G)
10 Tvørabáturin
11 Rádni
12 Strálan
13 Víkingur
14 Kollfirðingur

**Áttamannafør**
7 Kvívíkingur
8 Árnfirðingur
9 Heiðabáturin
10 Argjabáturin
11 Miðvingur

**Fimmmannafør, dreingir**
4 Tambar (1G)
5 Blikur
6 Katla
7 Tjaldrið
8 Havfrúgvin
9 Sílið
10 Junkarin
11 Snípan
12 Teistin (1G)
13 Jallurin

**Tíggjumannafør**
7 Nólsoyingurin
8 Ormurin
9 Havnarbáturin
10 Eysturoyingur